# Føroyar til próvtøku í ST

**Komandi ár skulu Føroyar aftur til próvtøku hjá ST viðvíkjandi lágari kvinnuligari umboðan. Í dag – ST-dagin – skipar Demokratia fyri fundi um hetta í Miðlahúsinum**

KVINNUUMBOÐAN

Á ST-degnum mikudagin 24. oktober skipar Demokratia (Nevndin fyri øktum kvinuleikluti í politikki) fyri fundi í Miðlahúsinum. Evnið er Føroyar og CEDAW-próvtøkan 2008. CEDAW er stovnur undir ST, sum arbeiðir við at beina fyri mismuni móti kvinnum. Føroyar undirskrivaðu CEDAW-sáttmálan í 1987. Í fjør vóru Føroyar til próvtøku í CEDAW, og atfinningarnar vóru nógvar. CEDAW átalaði lágu kvinnuumboðanina í politikki, í akademiska umhvørvinum og í leiðandi størvum og lønarmunin millum føroyskar menn og kvinnur.

Í 2008 skulu Føroyar aftur til próvtøku. Hvat skal til, so vit ikki aftur dumpa? Á fundinum greiðir Kitty-May Ellefsen frá próvtøkuni í fjør og metir um, hvat krevst. Í panelinum vera Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í javnstøðumálum; Hans P. Strøm, fyrrverandi landsstýrismaður í javnstøðumálum, og Heidi Petersen, løgtingskvinna fyri Tjóðveldi. Fundurin verður kl. 19 í Miðlahúsinum og er almennur.




# Eiður Guðmundsson fær fyrsta diplomatbilin í Føroyum

**Tann fyrsti diplomatbilurin í Føroyum nakrantíð er skrásettur, og hann fær fyrstu føroysku bláu nummarpláturnar í morgin**

SENDISTOVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í februarmánaði varð nýggjar íslendskur aðalkonsul tilnevndur, og var tað fyrrverandi altingslimurin, Eiður Guðnason. Hann kom úr starvi sum sendimaður í Íslands í Kina. Sjálvur segði hann, tá hann tók við starvinum, at hann kom úr tí størsta landinum til tað besta landið.

Hóast Eiður Guðnason ber heitið "aðalkonsul", so hevur hann kortini diplomatstatus. Tað merkir, at hann verður vardur av immuniteti sambært "Wienerkonventiónini frá 24. april 1963 om konsulære forbindelser".

Sum ein liður í hesum er bilurin, sum hoyrir til íslendsku sendistovuna skrásettur sum diplomatbilur. Men av tí at hetta var fyrstu ferð í søguni, at ein diplomatbilur skuldi skrásetast í Føroyum, so átti Akstovan ongar bláar nummarplátur, sum diplomatbilar eiga at hava. Men nú eru nummarpláturnar fingnar til vega, og í morgin fær bilurin hjá íslendsku sendistovuni nýggju pláturnar á bilin.

Og tað merkir ikki heilt einki, tá ein bilur hevur bláar nummarplátur. Tá er hann vardur av immuniteti, og førarin við diplomatstatusi kann ikki rættarsøkjast. Løgreglan kann sjálvandi steðga bilinum, um hann fremur brot at ferðslulógina, men kann ikki rættarfylgja diplomatinum.

Sambært Winersáttmálanum, so sleppa diplomatar undan toll-, skatta- og avgjaldsskyldu, tó við onkrum undantøkum.

Í veruleikanum er íslendska sendistovan í Føroyum at rokna sum ein partur av íslandi.



*Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni, við fyrstu føroysku diplomatnummarplátunum, sum í morgin verða settar á bilin hjá íslendska aðalkonslinum í Føroyum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Lat okkum gera húsvognin vetrarkláran.
Vit smyrja bremsur, stuðulsbein v.m.
Tøma vatntangar og reinsa vatnskipan
Gera gasstest
Vit vera á Lívsstílsstevnuni á Hálsi
27. - 28. oktober

Viðfestisvognar til einhvønn tørv
Til húsbrúk og vinnu
Vanligir vognar
Bátavognar
Vippuvognar
Hestatransportarar
Maskin og bil transportarar
Innilokaðir vognar
Brenderup

STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

WÜRTH MONTAGEPROFI

Würth messa á Hjalla
Í døgunum 25., 26. og 27. oktober verður Würth messa á Hjalla 6 í Hoyvík (har verkstaðið hjá Strandferðsluni fyrr helt til).
Vit fara at sýna fram eitt stórt úrval av tí, sum vit selja innan okkara fýra høvuðsvinnur:
AUTO ▪ METAL ▪ EL ▪ TRÆ
...og fara vit sjálvandi at hava nøkur sera góð messu-tilboð!
Messan er opin soleiðis:
Hósdag 25. & Fríggjadag 26. frá kl. 10.00 til kl. 18.00
Leygardag 27. frá kl. 11.00 til kl. 16.00
Claus Christensen Tel 22 50 17
Bernhard Jacobsen Tel 22 23 26
WÜRTH Würth Føroyar